UTTAN ÚR HEIMI

## Bjarga gomlum njósnaraflogfari

**Á sumri í 1952 skutu russar eitt svenskt njósnaraflogfar niður í altjóða loftrúmi yvir Eystrasalti. Nú verður vrakið tikið uppaftur**

NJÓSNING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Kalda kríggið var í hæddini, tá eitt sovjetskt jagaraflogfar av slagnum MIG-15 skjeyt tað svenska flogfarið niður. Sviar mótmæltu og vildu vera við, at tey átta fólkini í tí svenska flogfarinum vóru á einari vanligari venjingarferð. Russar svaraðu aftur, at teir høvdu als ikki skotið nakað flogfar niður.

Ikki fyrr enn í 1983 játtaðu svensku myndugleikarnir, at flogfarið í veruleikanum hevði verið á njósnaraferð. Átta ár seinni, í 1991, viðgingu russar so, at tað var eitt av teirra flogførum, sum hevði skotið tað svenska flogfarið niður, tí tað hevði njósnast fyri USA og Bretland. Tað avsannaðu sviar, men í 1993 viðgekk svenska stjórnin, at upplýsingar frá njósnaraflogførunum vórðu sendar amerikanarum og bretum.

Nú, 52 ár seinni, skal vrakið av tí niðurskotna njósnaraflogfarinum takast upp av botni í landnyrðing úr Gotlandi. Tað bleiv funnið seinasta summar á 70 favna dýpi. Bjargingararbeiðið byrjaði hósdagin.

# Hon bleiv fríkend

**Rætturin í Helsingfors fríkendi í gjár fyrrverandi forsætisráðharran Anneli Jæættenmæki fyri valdsmisnýtslu**

FINNLAND
*Árni Joensen*
*Fartekst@mail.dk*

Anneli Jæættenmæki var ákærd fyri at hava ognað sær loynilig skjøl av forsetaskrivstovuni, meðan hon var andstøðuleiðari. Hetta var beint upp undir ríkisdagsvalið í mars í fjør, og Jæættenmæki nýtti upplýsingarnar í teimum loyniligu skjølunum undir valstríðnum.

Við hesum upplýsingunum kundi hon vísa á, at Paavo Lipponen, forsætisráðharri, hevði tosað við amerikonsku stjórnina um Irak, og at forsætisráðharrin hevði stuðlað amerikonsku álopsætlanini, sjálvt um Finnland alment var ímóti. Úrslitið varð, at Miðflokkurin vann valið, og at Anneli Jæættenmæki gjørdist stjórnarleiðari.

Men bara nakrar fáar vikur seinni bleiv avdúkað, at hon hevði nýtti tey loyniligu skjølini, og at hon hevði misnýtt sína støðu fyri at fá afatur á teimum. Málið hevði við sær, at hon máti leggja frá sær sum forsætisráðharri.

Men í gjár fríkendi rætturin hana. Ráðgevin hjá forsetanum, sum lat Anneli Jæættenmæki fáa skjølini, bleiv dømdur at gjalda 3600 evrur í bót.



*Anneli Jæættenmæki noyddist frá, men nú er hon fríkend*

# USA ongantíð havt so lítla undirtøku kring heimin sum nú

**Umdømið hjá USA kring heimin er viknað so nógv hetta seinasta árið, at amerikanarar eru farnir at stúra fyri, at landið fer at missa sínar sameindu. Í muslimskum londum er bin Laden betur umtómtur enn Bush**

UMDØMI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Avgerðin hjá George W. Bush, forseta at leypa á Irak uttan stuðul frá ST og nøkrum av teimum týdningarmestu londunum í NATO hevur kostað amerikanska umdøminum uttanlands so nógv hetta seinasta árið, at USA hevur ongantíð havt so lítla undirtøku kring heimin sum nú.

Ein meiningakanning í níggju londum avdúkar, at fólk hava yvirhøvur eina aðra uppfatan av krígnum í Irak, enn amerikanarar hava. Eitt nú eru tað bara amerikanarar, sum halda, at Irak-kríggið hevur havt positivan týdning fyri bardagan ímóti altjóða yvirgangi.



*Í fleiri londum halda tey flestu, at kríggið í Irak hevur ikki gagnað viðurskiftunum í heiminum*

Í hinum átta londunum halda tey flestu, at kríggið hevur gjørt støðuna verri, og kanningin vísir eisini, at summir amerikanarar bera ótta fyri, at USA fer at missa fleiri av sínum sameindu.

– Tað er ørkymlandi, at tað eru bara amerikanararnir, sum halda, at kríggið í Irak hevur hjálpt, sigur Madeleine Albright, sum var uttanríkisráðharri í Clinton-stjórnini, og sum hevur staðið á odda fyri kanningini.

Kanningin vísir eisini, at burtursæð frá amerikanarunum sjálvum halda tey flestu lítið um George W. Bush, forseta, og í teimum muslimnsku londunum, sum eru við í kanningini, er Osama bin Laden betur umtóktur enn amerikanski forsetin.

Madeleine Albright heldur kanningina vísa, at tað gamla samstarvið ímillum USA og Evropa er broytt og er vorðið eitt slag av kapping. Tað er eisini nakað, sum bendir á, at so er, tí í kanningini sigur meirilutin av teimum spurdu í NATO-londunum Bretlandi, Fraklandi, Týsklandi og Turkalandi, at Vesturevropa eigur at ganga egnar leiðir, tá talan er um trygd og diplomati.

### Oljan var málið

Londini, sum eru við í kanningini, eru USA, Frakland, Bretland, Týskland, Russland, Marokko, Jordan, Turkaland og Pakistan. Kanningin varð gjørd undan atsóknini í Madrid í síðstu viku.

Í kanningini sæst, at tað eru bara amerikanararnir, sum trúgva George W. Bush, forseta, tá hann sigur, at amerikanska málið er at virka fyri demokratii í heiminum, og í seks av hinum átta londunum er meirilutin av teirri áskoðan, at amerikanska málið við álopinum á Irak var at fáa ræði á iraksku oljuni. Tað halda 48 prosent av teimum spurdu í Russlandi eisini.

Ein stórur meiriluti av teimum spurdu í Fraklandi, Russlandi, Týsklandi, Pakistan, Turkalandi og Jordan siga, at amerikanska stjórnin leyg um hópoyðingarvápnini hjá Irak, og í Jordan og Marokko sigur ein stórur meiriluti, at sjálvmorðsbumbumenn hava fullan rætt til at søkja at amerikanarum og øðrum vesturlendingum í Irak. Tað halda 46 prosent av teimum spurdu pakistanunum eisini.






# One World Beat um allan heim



*Vegna sjúku kann All That Rain ikki verða við til »One World Beat-tiltakið« í Mentanarhúsinum í Fuglafirði*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Alheims festivalurin One World Beat byrjaði í gjár. Føroyski parturin av festivalinum fer fram í Fuglafirði og er skipaður so, at fyrra kvøldið var tónleikurin meira til yngra lurtaran, meðan kvøldið í kvøld, leygarkvøldið, er til tilkomnu fjøldina. Talan er um globalan festival, ið hevur til endamáls at stuðla ymsum hjálpararbeiði og í ár fer peningurin til aids rakt børn**

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

One World Beat tiltakið er um vikuskiftið í 40 londum og føroyski parturin fer fram í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Fríggjakvøldið var til tey yngru, har skráin bjóðai bólkarnar 48 Pages, Speaker, Sic, Deja Vu og All That Rain.

Leygarkvøldið eiga tey tilkomnu og í kvøld fara Tey av Kamarinum, Twilight, Martin Joensen, Ronnie Poulsen, Fluffy Toys, Ronnie og Sámal og Afenginn á pallin. Talan r um café og dans aftaná. Bussar koyra í samband við tiltakið í Fuglafirð um vikuskiftið.

Tað er Fut, ið samskipar føroyska partin av alheims tiltakinum og væl hevur gingist, sigur Kaj Johannesen, sum fegnast um vælvildina, ið hann hevur upplivað allastaðir hann hevur vent sær í samband við fyrireikingarnar av One World Beat

– Man hevur ikki hoyrt um HIV/AIDS tilburðir í Føroyum tey seinastu 5 árini.

Tað man týða uppá at upplýsingararbeiðið hjá læknum, heilsusjúkrasystrum og øðrum hevur munað. Og tað er júst har vit her heima kunnu gera mun, við at stuðla upplýsingini og keypi av heilivági til hesi sakleysu og ólukkuligu børnini, sigur Kaj.

– Latum okkum í felag geva líkasæluni durafjóringin, við at stuðla OWB Altjóða Festivalinum. Ein hundraðkrónuseðil ger stóran mun hjá felagskapinum Keep A Child Alive, minnir Kaj á.

– FUT & Mentanarhúsið ynskja at takka øllum teimum, sum so dyggiliga hava hjálpt til, við at fáa fyrireikingarnar til Alheims Festivalin: One World Beat, undir land. Og ikki at gloyma høvuðsstuðlunum: Bónus, Føroya Bjór, Estra, Kongshavnar Útgerðarfelag og Andreas Poulsen, Busskoyring, sigur Kaj.

### Um allan heim

Um allan heim verður tiltakið One World Beat skipað og peningurin fer til Keep a Child alive, sum skipar hjálp til aids rakt børn. Ósek børn, ið hava fingið AIDS/HIV í móðurlívi ella tá tey hava fingið blóð.

Til ber at keypa atgongumerki í forsølu og er ein ætlanin við hesum, at til ber at stuðla, uttan beinleiðis at binda seg til at fara til tiltakið, um hetta ikki liggur fyri

Lagt er upp til eina globala uppliving í Fuglafirði um vikuskiftið, har heimsins tónleikarar fara á pall samstundis og nakrir av Føroya dugnaligastu og best dámdu tónleikarum gera sítt til at hjálpa og annars skapa eina hugnaliga løtu. Meira fæst at vita við at vitja hesar leinkjur og har ber eisini til at stuðla.

http://heima.olivant.fo/~kartnif/, www.keepachildalive.org og www.oneworldbeat.org




I·net BREIÐBAND

| Nýtslutørvur | Nýtslumynstur | Prísur/mðr. | Ferð | Frí nýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Lágur | Surf, postur, chat og spæl | Kr. 280,- | 256k/128 | Eingin. 50 oyru/Mbyte. |
| Miðal til stórur | Surf, postur, chat, spæl og tónleikur | Kr. 595,- | 512k/128 | 2 Gbyte. Yvir 2 Gbyte: 50 oyru/Mbyte. |
| Stórur | Surf, postur, chat, spæl, tónleikur og filmur | Kr. 895,- | 1024k/128 | 3 Gbyte. Yvir 3 Gbyte: 50 oyru/Mbyte. |

Vanligur prísur fyri stovning er kr. 750,-

**Bíleggið nú og sparið kr. 750,-*) í stovning**

- Upp til 20 ferðir skjótari enn uppringt samband
- Støðugt fast samband
- Tosa og surfa samstundis - ikki neyðugt við eyka linju
- Fleiri upplivingar á alnetinum

**Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...**

*) Treytað av at tú teknar I·net breiðbandhald frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 31. mai 2004. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.

FØROYA TELE